# Róp komið í á G!




Onkur hevur nevnt teir nýggju vónina innan føroyskan rock, onnur hava kallað teir arvingarnar eftir kanska besta føroyska rockbólkin Krit, meðan onnur bara hava hildið teir verið kærkomið nýtt soð í føroysku rokksúpanini.

Hvussu er og ikki, er í øllum førum greitt, at tú kanst gera tína egnu meting, tá bólkurin Róp trínir pallin á G! Festivalinum 16. og 17. juli í ár.

RÓP spælur harðan atmosferiskan rock - hørð riff og ja..., róp, blandað við vøkur, mangan sorgblíð hugaløg, melodiir og sang. Hóast bólkurin er rættiliga nýggjur, hoyrast røturnar aftur til eitt nú Krit í villu, frumkendu rytmudeildini hjá Christian og Chris, meðan annar fjølbroyttur íblástur kemur gjøgnum sangaran úr Scatgoh og guitarleikararnar úr Marigold og Stinkfist. Bólkurin er harvið eisini ein áhugaverd samanrenning av stílum, økjum og tónleikaumhvørvum í landinum. Hóast ymsastaðni frá, hava teir hildið til og vant í GRÓT-umhvørvinum í Eysturoy.

Limirnir í RÓP eru: Heri Trondesen sang; Rókur Heinesen guitar; Simun Skorastein guitar; Christian Djurhuus trummur; Chris Shields bass.

# I AM byrjar konsertferð í Gøtu

Í summar ferð fremsti kristiligi rokkbólkurin í Føroyum, I AM, á konsertferð í Finnlandi og Danmark. Byrjunarskotið til konsertferðina verður latið av á G! Festivalinum leygardagin 17. juli.

I Am spæla harðan melodiøsan rokktónleik og hava við sermerktu røddini hjá Birgiri I. Sirgurðssyni og framúr góða guitarleikinum frá Arna Zachariassen vunnið sær ein stóran skara av fjepparum. Umframt hópin av konsertum í Føroyum, hava I AM fleiri ferðir verið á konsertferð kring Norðanlond, eins og teir fara aftur í summar.

Síðan stovnan hevur I AM verið fremsti kristilligi rokkbólkurin í landinum. Fleiri ferðir hava teir verið nummar 1 á 15 teimum bestu, teir vunnu Gospel Prix 2003, eins og teir vunnu sær sæti í Prix Føroyar finaluni í 2001.



I AM hava givið tvær fløgur út. "CAST" í 1999, sum seldi 1500 eintøk og "xthree.one.four", sum kom út í fjør, og sum higartil hevur selt útvið 1800 eintøk! Við "xthree.one.four" megnaðu I AM, bæði frá ummælarum og á mannamunni at fáa heiðurin fyri ársins bestu rokkfløgu 2003. At I AM bert heilt stutta tíð, eftir at fløgan kom út, seldu útvið 1000 eintøk, má eisini takast sum váttan um júst hetta. Royal Music hava givið "xthree.one.four" út í Danmark og fløgan hevur fingið fleiri góð ummælir ymsastaðni kring knøttin.

Manningin í I AM telur sangaran Birgir I. Sigurðsson, Eyðbjørn Jacobsen á bass, Heðin A. Olsen tangentar, Hans Ova Johansen trummur og Arna Zachariassen guitar.

# Gunnar næstovast og til Klaksvíkar

Hálføroyski poppsangarin Gunnar Mikkelsen, sum vann kappingina Stjørna í eitt kvøld í fjør, hevur gjørt um seg í danska tónleikalívinum seinastu vikurnar.

Eftir at fyrsta fløgan hjá honum kom út fyri einum mánaði síðani, hevur ein av sangunum verið nógv spældur í donskum útvarpi.

Sangurin kallast Haunted Honeymoon, og hann hevur staðið seg væl á Tjeklistanum, sum er ein hitlisti hjá Danmarks Radio. Sangurin var í síðstu viku nummar 1, men hesa vikun hevur hann ligið á næstovasta plássinum.

Tjeklistin verður avdúkaður hvønn leygardag, og í dag fæst so at vita, hvørja leið sangurin nú fer at taka.

Gunnar Mikkelsen kemur í august mánaði til Føroya at syngja aftur. Tað fer hann at gera á nýggja tónleikafestivalinum, sum verður hildin í Klaksvík miðskeiðis í august mánaði.

Tá skal Gunnar Mikkelsen framføra saman við nøvnum sum Ken Hensley, Hans Inge Fagervik, Frændur og Hanus G. Johansen.





UTTAN ÚR HEIMI

## NATO til Irak

Higartil hevur NATO ikki viljað lagt seg út í tað, sum hendir í Irak, men nú er líkt til, at verjusamgongan er sinnað at ganga einari áheitan frá teimum iraksku myndugleikunum á møti.

Irakar hava biðið NATO um hjálp, og sambært aðalskrivaranum í verjusamgonguni, Jaap de Hoop Scheffer, fer NATO helst at svara, at samgongan er til reiðar at hjálpa irakum við at venja irakskar hermenn. Sum skilst er NATO til reiðar at venja hermenninar í sjálvum Irak ella onkra aðrastaðni. USA hevur fyrr biðið NATO senda hermenn til Irak, men tann harða franska og týska mótstøðan ímóti krígnum ger, at tað ber ikki til at fáa semju um tað. Eitt nú hevur Týskland boðið sær til at venja irakskar hermenn, men ikki í sjálvum Irak.

Mánadagin og týsdagin hittast leiðararnir í NATO-londunum í Istanbul, og tá fara teir ætlandi at umrøða áheitanina fyri iraksku myndugleikunum um hjálp.

## Stevna Niðurlondum

Fólk, sum sluppu livandi frá hópmorðinum í bosniska býnum Screbrenica í 1995, fara nú at leggja sak ímóti Niðurlondum.

Orsøkin er, at niðurlendskir ST-hermenn høvdu ábyrgdina av trygdini í Screbrenica, tá serbiski herurin rak ímillum 7.000 og 8.000 menn og dreingir úr býnum og beindi fyri teimum. Fyri tveimum árum síðani kom ein niðurlendsk kanning til ta niðurstøðu, at teir niðurlendsku ST-hermenninir vóru alt ov fámentir, til at teir kundu verja fólkið í Screbrenica. Tí var niðurstøðan, at tað vóru ikki hermenninir, men tann politiska og tann hernaðarliga leiðslan, sum hevði ábyrgdina av tí, sum hendi.

Ein sakførari hjá teimum, sum sluppu livandi frá hópmorðinum, hevur fyrr sagt, at ætlanin er at leggja sak ímóti Niðurlondum og ST, og at tey eftirlivandi fara at krevja einar 500 milliónir dollarar í endurgjaldi fyri tað, sum hendi í Screbrenica í juli í 1995.

## Týskland má selja

Fyri at fáa avmarka hallið á fíggjarlógini næsta ár ætlar týska stjórnin at selja øll tey almennu partabrøvini í stóru telefyritøkuni Telekom og postverkinum.

Stjórnin roknar við, at útreiðslurnar á fíggjarlógini næsta ár verða 258 milliardir evrur, men fyri at fáa roknistykkið at ganga upp, má stjórnin læna 22 milliardir evrur, samstundis sum almenn partabrøv skulu seljast fyri góðar 15 milliardir evrur. Tað er kortini ikki nóg mikið, og tí umhugsar stjórnin at selja tað, sum Týskland eigur til góðar hjá russiska ríkiskassanum. Russland skyldar Týsklandi 14 milliardir evrur.

Tann konservativa andstøðan tekur undir við at einskilja Telekom og postverkið, men hon heldur, at stjórnin tekur í so rívan til. Verður alt selt nú, fær tann næsta stjórnin einki at standa ímóti við, sigur andstøðan.

## SAS í øðini

Leiðslan í skandinaviska flogfelagnum SAS er í øðini um, at kappingarneytin Alitalia fær stuðul úr italska ríkiskassanum.

Innan altjóða flogferðsluna er tann vanliga hugsanin, at nøkur av feløgunum noyðast at gevast orsakað av teirri hørðu kappingini, fyri at hini kunnu halda fram. Tí kemur tað illa við, at italska stjórnin hevur boðað frá, at hon arbeiðir við einari ætlan, sum skal bjarga Alitalia. Kunningarstjórin hjá SAS, Hans Ollongren, sigur við Aftenposten, at við almennum stuðuli sleppur italska felagið undan at laga seg eftir marknaðinum, og tað kunnu hini feløgini ikki góðtaka.

ES-nevndin er heldur ikki fegin um ætlanina hjá italsku stjórnini. Nevndin hevur gjørt greitt, at hon skal góðkenna allan tílíkan stuðul, áðrenn hann kann latast.

# Meiri olja í Norðsjónum enn higartil hildið

**Nýggjar jarðfrøðikanningar í danska partinum av Norðsjónum vísa, at har eru nógv meiri olja og gass, enn serfrøðingar higartil hava hildið.**

OLJA

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Ein nýggj frágreiðing hjá danska orkuráðnum er hugaligur lesnaður hjá dønum. Har stendur, at sambært nýggjum jarðfrøðikanningum eigur tað at bera til at útvinna 481 milliónir rúmmetrar av olju í danska partinum av Norðsjónum. Tað er væl meiri enn higartil hildið, tí sambært teirri seinastu frágreiðingini hjá orkuráðnum var nøgdin 357 milliónir rúmmetrar, skrivar Jyllandsposturin.

Søgan er tann sama, tá tað snýr seg um gassið. Fyri einum ári síðani segði orkuráðið, at 136 milliónir rúmmetrar av gassi eru eftir í Norðsjónum, men nú er talið 288 milliónir rúmmetrar.

Í fjør gjørdu stjórnin og A.P. Møller eina avtalu um olju- og gassframleiðsluna í Norðsjónum. Tann avatalan er grundað á tær 357 milliónir rúmmetrarnar, sum orkuráðið tá segði, og nú vilja sosialdemokratarnir hava at vita, hvussu avtalan sampakkar við tær nýggju upplýsingarnar.

Hinvegin er greitt, at stjórnin kann ikki broyta avtaluna við A.P. Møller, tí sambært henni skulu oljufeløgini hava endurgjald, verður avtalan broytt.

Í fjør fekk danski ríkiskassin 9,1 milliardir krónur í skatti og avgjøldum frá oljuvinnuni í Norðsjónum.

# Tornado-tíð

Summarið er vanliga tornado-tíð í USA, og tær fyrstu hava longu gjørt um seg.

Týsdagin herjaði ein tornado býin Waupuin í statinum Wisconsin. Fleiri hús fóru illa, teirra millum tað elsta fongslið í Wisconsin, sum er frá 1852. Mikumorgunin herjaði ein tornado Green Lake County. Har doyði ein maður doyði, og fleiri hús og bilar fóru illa.

Men tað er ikki bara í USA, at tornadoir gera um seg. Hendan myndin varð tikin í Týsklandi mikudagin. Har herjaði ein tornado býin Aken sunnan fyri Berlin, og meiri enn hundrað hús vórðu oyðiløgd.



# Sveis var fíggjarmiðstøð hjá al-Qaeda

**Sveisisku myndugleikarnir vilja vera við, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda brúkti Sveis sum miðstøð til at fíggja atsóknirnar.**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Sveisiska ákæruvaldið fyrireikar trý rættarmál, sum hava samband við felagsskapin hjá Osama bin Laden. Tíggju fólk eru longu tikin í sambandi við málini, og seks teirra sita í varðhaldi.

Tað fyrsta málið er ímóti einari fíggjarfyritøku, sum eitur Nada Management. Fyritøkan heldur til í býnum Lugano tætt við italska markið, og ákæruvaldið vil vera við, at hon hevur verið við til at fíggja yvirgangsatsóknir.

Tað næsta málið er ímóti einum saudiarabiskum ríkisborgara. Hann er skuldsettur fyri at hava flutt al-Qaeda nógvar pengar ígjøgnum ein hjálparfelagsskap.

Tað triðja málið hevur samband við eina atsókn í saudiarabiska høvuðsstaðnum Riyadh í mai í fjør. Kanningar hava víst, at teir, sum skipaðu fyri atsóknini, høvdu havt telefonsamband við fleiri fólk í Sveis.